# ra kiksaður



*– Tað er okkurt ótrúliga løgið í, at ein fløga verður hildin at vera djørv og sermerkt, tí hon hevur nakað uppá hjarta, heldur tónleikarin aftanfyri ársins mest sermerktu fløguútgávu*

ímynda mær, hvussu vit í dag skuldu gjørt pláss fyri Michelangelo, Bach ella Haydn innafyri trongu karmarnar í okkara kirkjum og samkomum.

– Eitt er, at modernaði kristin tykjast at hava mist sambandið millum trúnna og listina úr eygsjón. Vit megna eftir øllum at døma heldur ikki at rúma listini uttan so, at hon hevur eitthvørt nýtsluvirði. Ein sangur skal til dømis helst kunna umvenda so og so nógv menniskju, áðrenn hann hevur uppiborið eitt pláss innan kirkjugátt ella í eini samkomu. Í grundini er tað rættiliga óhugnaligt, at kristindómurnin soleiðis hevur yvirtikið ein nyttumoral, vit annars helst seta í samband við ídnaðarkollveltingina, hugleiðir Knút. Sjálvur heldur Knút fast við at brúka tónleikin sum ein máta at prísa skapanarverkinum og vakurleikanum. Eisini tær løtur, tá ivin og uppgerðin spøkja, sum til dømis í lagnum "Shine"

– "Shine" er ein uppgerð við tann Gud, sum verður borðreiddur fyri mær allastaðni, men sum als ikki er tann sami, sum eg lesi um í Bíbliuni. Eitt tað størsta mistakið, menniskjan hevur gjørt, er at royna at billa sær inn, at átrúnaður og trúgv er tað sama. Úrslitið, er at vit standa eftir við nøkrum innantómum stovnsfestum reglum og siðvenjum, sum vit tvíhalda um í berari ræðslu fyri at hyggja at okkum sjálvum. "Shine" er also mín uppgerð við royndina hjá menniskjum at redusera trúnna á Gud til eitt sosialt reglusett ella okkurt slag av klisturmerkjatrúgv, uttan innihald.

Knút dylur ikki yvir, at hann í løtum heldur tað vera trupult at vera trúgvandi í einum samfelag, har sambandið millum tað, sum Bíblian fortelur honum og tað, sum tíðarandin vil hava hann at jagstra, er horvið.

– Sum øll onnur, standi eg og eygleiði eitt samfelag, har líkasælan og materialisman hava tikið ræðið, men sum eg onkusvegna eisini skal vera partur av. Fyri meg er loysnin mín Gudstrúgv, og í mínum hugaheimi verður Jesus hvørki minni sannur ella vakur fyri tað, um eg ikki kann prógva, at hann er til. Eg havi tað, sum Dostejevski, sum segði, at sjálvt um onkur prógvaði fyri honum í morgin, at Gud ikki var til, hevði hann framvegis valt at trúð uppá hann. Fyri summi kann ein slík sannføring uttan iva tykjast bláoygd, desperat og beinleiðis snævurskygd, men fyri meg letur hon heldur upp fyri nøkrum størri, við tað at hon ásannar, hvussu avmarkaði vit eru sum menniskju.

## Doyvdir føroyingar

Við trúnni fylgir altíð ein ábyrgd fyri at geva tær far um tað, sum hendir rundan um teg, heldur Knút, og tí aftrar hann seg heldur ikki við at blanda seg uppí almenna politiska kjakið. Og beint eftir seinasta løgtingsval mundu fleiri eisini varnast, at keyboardleikarin í Gestum, var vorðin ein av høvuðspersónunum í einum drúgvum orðadrátti um fullveldisgongdina.

– Eg havi ongantíð fjalt út yvir, at eg kendi tað sum eitt stórt vónbrot at síggja, hvussu støðið spakuliga men áhaldandi bleiv máað undan teimum kreftum, sum høvdu stungið fullveldiskósina út í kortið. Hetta kjakið snýr seg ikki bara um, hvussu ósunt og niðurbrótandi tað er, at eitt land ikki hevur evstu ábyrgdina fyri sínum fíggjarligu og rættarligu viðurskiftum. Eg stúri eisini av álvara fyri, hvat hetta fer at gera við okkum sum menniskju sum frá líður, tí uppá fleiri mátar líkist okkara politiska støða onkrum slag av narkomani: Vit eru vorðin so bundin og doyvd av fíggjarliga stuðulinum frá Danmark, at vit fáa ikki liva uttan longur, tíansheldur ímyndað okkum, hvussu støðan kundi verið øðrvísi. Eins og misnýtarar desperatir leita eftir rúsevnum, hevjar føroyskur politikkur seg sjáldan longur upp enn til eitt ørkymlað klandur um pengar, sigur Knút, sum heldur tað vera bæði hugstoytt og pínligt at síggja, hvussu føroyingar fara at piprast við tankan um, at okkara methøga livistøði skuldi lække eitt vet.

– Fyri mær sær tað út til, at vit føroyingar eiga ongan stoltleika í okkum longur, og tað ringasta er, at tað sær ikki út til at órógva okkum stórvegis. Eg veit ikki, um vit eru so kúgaði, at vit ikki longur vita av tí, ella um vit bara eru líkaglað. Í hvussu er, er tað onki sum bendir á, at vit eru til reiðar at stríðast fyri nøkrum øðrum enn tí, sum rakar okkara pengapung, sigur Knút, sum heldur ongantíð hevur skilt ráðandi hugburðin um, at "Vit hava tað jú fínt, sum er."

– Tað tykist sum at fólk halda, at tey harvið hava tryggjað seg móti broytingum. Men øll samfeløg broytast, uttan mun til, um vit vilja tað ella ikki. Vit kunnu lata standa til, og harvið lata onkran annan gera av, hvagar leiðin skal ganga, ella vit kunnu rópa varskó og ganga okkara egnu leið. Men tað avgerðina er tað bara vit sjálvi, sum kunnu taka, sigur hugsunarsami tónleikarin at enda.